# 50 norskir pensiónistar vitja



Í komandi viku vitjar ein bólkur av norskum pensiónistum í Føroyum. Tey eru 50 í tali, og skulu tey ferðast kring oyggjarnar í bussi, sum tey sjálvi hava við sær. Týsdagin vitja tey millum annað Tøting í Gøtu, Fríðrikskirkjuna og Leguhúsið í Nesvík. Annars skulu vitja í Gásadali, kirkjuni í Sandavági, Vestmannabjørgini og í Sandoynni. Við í ferðalagnum er dansk-norski trúboðarin, Klaus Muff, og skal hann tala á einum møti, sum verður í Argja kirkju týskvøldið í næstu viku. Tað er John S. Myllhamar í Sandavági, ið hevur lagt teimum túrin til rættis.

# Kvinnur standa og pissa

P-mate er ein fyritøka, sum framleiðir at slag av traktum, sum ger, at konufólk kunnu standa og pissa eins og rættir menn. P-mate gjørdist kent millum festivalvitjandi í Føroyum í fjør, og í ár skulu 26 fólk frá fyritøkuni luttøkuni luttaka á Roskilde Festivalinum. Stórar fyrireikingar hava verið til hettar tiltakið og nógv orka liggur aftanfyri hettar arbeiði, har endamálið er at fáa konufólk at pissa standandi. Tað eru føroyingarnir Silvia Dalsgaard, Jóna Kristin Thomsen og Linda Mortansdóttir sum samskipa arbeiði. Incra Sp/F v/Regin W. Dalsgaard er felagið aftanfyri verkætlanina.

# rik í Århus



*Boys In A Band vóru sera væl upplagdir*

*mynd: Niels Uni Dam*

tó nakað av konsertupplivingini.: "Endelig kommer der et nummer, der både er hævet lidt i tempo i forhold til resten, og som også lader Eivør bruge sin stemme til andet end kedelig skønsang. Hun vrænger og skriger og improviserer, og det løfter koncerten op på det niveau, hvor den hele tiden burde have ligget. En rigtig god bonus, der gør, at man går væsentligt gladere fra salen, end de, der forduftede allerede efter halvandet nummer."

### Peppaðir kovboyarar

Mest hypaði bólkur á føroyska tónleikapallinum í løtuni er Boys In A Band. Bólkurin fór á pall sum fyrsti bólkur leygardagin stutt eftir miðdag. Teir fóru á pall í Officersteltilnum framman fyri eini áskoðarafjøld, ið ikki var heilt vaknað enn, sigur ummælarin Anja Fjølleslev. Boys In A Band fáa rós fyri at vera somikið væl upplagdir: "Energien fra hele bandet var intens, og deres koncert bar ikke præg af, at klokken var to om eftermiddagen. De performede alt, hvad de kunne fra start til slut. Desværre var det svært at få meget ud af teksterne, fordi vokalen druknede i larm, og forsøg på at trænge igennem synes umulig, og som en bevidst del af udtrykket. Så på sin vis gjorde det knap så meget med teksterne, for melodierne og indpakningen gav publikum et godt indblik i et talentfuldt band godt på vej."

Sum heild er ummælið jaligt, hóast trummuspælið verður mett at vera eitt sindur ov monotont, og mest snúgva seg um ein larmandi High Hat. Lagið Before The Flow verður tikið fram sum tað besta og mest fjølbroytta hjá bólkinum.

Í stóran mun snýr ummælið seg um, at bólkurin sigur seg spæla kovboyrokk, og um hann veruliga ger tað, og hvørji kovboyelementini í tónleikinum eru.

### Einki um Mariu

Innan fyri karmarnar á Spot festivalinum var skipað fyri verkætlanini Nordic Cowriters, her hittust 12 tónlistafólk og skrivaðu í pørum sangir saman hesa vikuna á Englesholm Højskole, har tey ikki vórðu órógvaði av umheiminum. Úrslitið av hesum samstørvum var framført á Nordic Cowriter konsertini. Í ummælinum av endakonsertini verður Maria ikki nevnd við einum orði.

Ummælarin tyktist ikki tikin á bóli av upplivingini: "Måske balladerne ligger lige for, når musikalske talenter der aldrig er mødtes, mødes ... og kun har fire dage sammen. Det kan også være en fælles forståelse af den nordiske Jantelov: lad være med at skrive det simple fede hit, det kunne jo være at du blev kendt."

Ummælarin endar við at koma við einum ráði: "... opfordringen må være at tematisere næste års Cowriter-session til noget i retning af "Don't take it that seriuosly"."

# The Prodigy spælir kanska á G!

**Hóast almenni miðlapartnarin hjá G!Festivalinum skrivar, at The Prodigy spælir á G!Festivalinum, er avtalan við enska bólkin ikki komin endaliga upp á pláss. Umboðsstovan hjá bólkinum váttar fyri Sosialinum, at samráðingar eru í gongd, men ikki lidnar enn. Heldur ikki G!Festivalurin hevur váttað tíðindini fyri Dimmalætting, sigur Jón Tyril**

0TÓNLEIKUR
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Hósdagin váttaði umboðsstovan hjá The Prodigy fyri Sosialinum, at bólkurin, ið má metast sum heimsins størsta ídnaðartekno navn, væntandi verður at hoyra á Gøtusandi. Boðini vóru, "Vit eru enn í samráðingum við G!Festivalin, og alt er ikki 100% váttað enn." Tað skiltist tá á G!Festivalinum, at ætlanin ikki var at avdúka høvuðsnavnið fyrr enn um nakrar vikur. Vit spurdu Jón Tyril fyriskipara av G!festivalinum hóskvøldið, um The Prodigy spæla á festivalinum í Gøtu í summar.

- Tað havi eg onga viðmerking til, einki navn verður váttað av festivalinum fyrr enn tað stendur á heimasíðuni hjá okkum, segði Jón og vildi als ikki práta meira um høvusnavnið. Tó kundu vit fríggjadagin lesa í Dimmalætting, at The Prodigy verður at hoyra á G!. Dimmalætting er almenni miðlapartnaranum hjá G!Festivalinum. Jón Tyril vísur tó aftur, at festivalurin hevur váttað fyri Dimmalætting, at The Prodigy spælir á G!. Í fjør bar Dimmalætting tíðindini um, at svenska songkvinnan Carola skuldi spæla á G!Festivalinum, men mátti tveir dagar seinni taka tíðindini aftur. Vónandi verður støðan ein onnur í ár.



*The Prodigy kunnu gerast ein festlig uppliving á G!Festivalinum*

*mynd: Polfoto*

### Var apan ein ábending?

G!Festivalurin hevur siðvenju fyri at leggja ábendingar í sínar lýsingar. Í nýggjastu lýsingini er ein apa. Tí hava nógv gitt um, at bólkar, sum t.d. Gorillaz, Arctic Monkeys ella Racing Ape, verða á festivalinum. Men vit vita av royndum, at G!Festivalurin seinastu tíðina hevur verið eitt sindur snildari enn so við sínum ábendingum. Soleiðis er eftir øllum at døma eisini hesaferð. Tað tók eitt sindur av njósnan og leitan at finna sambandið millum apuna og The Prodigy, og vit eru heldur ikki heilt vís í, at hetta er rætta loysnin. Men nýggjasta stakfløgan hjá The Prodigy av teirra savnsfløgu, ið kom út í fyrraárið, er eitt endurbland av hittinum frá 1994, Voodoo People. Í hesum lagnum samplar The Prodigy eitt gittarriff úr sanginum Very Ape hjá Nirvana. Her var apan. Langt úti? Ja, kanska. Men við tíðini eru vit vorðin somikið dugnalig at loysa gáturnar, at tær mugu gerast torførari. Um altso apan er ein gáta.

### Størsta navn innan greinina

Í The Prodigy hevur G!Festivalurin tryggjað sær eitt heimsnavn, sum síðan fyrst í nítiárunum hevur verið í toppinum á tónleikaheiminum. Bólkurin hevur hesi árini havt 9 stakfløgur í topp 10 í Bretlandi og 15 í topp 20. Størstu hittini eru uttan iva Breathe, ið seldi 700.000 eintøk og Firestarter, ið seldi ikki færri enn eina millión eintøk, báðar hesar stakfløgur vóru á ovastu rók á bretska sølulistanum, og seldu somuleiðis væl á risamarknaðinum í USA. Eingin bólkur hevur, sum The Prodigy verið við til at gera harða ídnaðarkenda tekno tónleikin til gerandiskost. Hetta hevur verið til íblástur fyri hópin av bólkum kring allan heim, og føroyskir bólkar sum Side Effect og All That Rain hava fingið íblástur frá bretska risanavninum.

### Gøtusandur fer upp frá

The Prodigy hevur seinastu tíðina arbeitt við eini nýggjari útgávu, ið eftir ætlan skuldi koma út í summar, men sum er seinkað nakað, tað skuldi tó merkt, at nýggjur tónleikur frá teimum verður á skránni á Gøtusandi. Stílurin er broyttur nakað hesi árini, og hevur millum annað ferðast innan greinar sum punk, alternativan rokk, rave og hard core tekno, men reyði tráurin hevur alla tíðina verið ein ómetalig orka. Tí er eingin ivi um, at Gøtusandur fer upp frá, tá ógvisliga ljóði av The Prodigy brakar út yvir sandin.